## Asbest í skúlunum



Skjøl hjá grønlendsku myndugleikunum hava avdúkað, at trúggir býskúlar og 11 bygdaskúlar í Grønlandi eru bygdir við tilfari úr asbesti, ið sum kunnugt skaðiligt fyri heilsuna. Myndugleikarnir viðganga kortini, at teir vita ikki, at nakar av teimum 14 skúlunum er umbygdur seinni, og um asbestið er koyrt burtur. Nú skulu skúlarnir kannast, og so eru tað politikararnir, sum gera av, um pengar skulu setast av til broytingar, sigur KNR.

## Turt gólv á Sandi

Veikur kanadiskur dollari ger, at tað loysir seg ikki at salta upsa á virkinum hjá Sandoy Seafood á Sandi, og tí er felagið givið at keypa upsa til saltingar har. Marner Lisberg, sum er nevndarformaður í Sandoy Seafood, segði við Kringvarpið í gjár, at arbeiðið á virkinum verður ikki tikið uppaftur, fyrr enn toskurin kemur aftur, og betri prísur fæst fyri saltfisk. Sandoy Seafood, sum eisini hevur virki í Skopun, rindaði 18,4 mió. krónur í lønum í fjør.

# Dapurskygni ræðu

**- Samanbera vit stovnsmetingarnar, ið gjørdar verða á hvørjum ári við veiðitøl hjá fiskiflotanum, er greitt, at yvirlitstrolingarnar geva eina góða mynd av, hvussu stórir stovnarnir av toski og hýsu eru. Eisini geva tær okkum ábendingar um, hvussu aðrir fiskastovnar eru fyri. Tað sær dapurt út við toski, hýsu og upsa í løtuni, ásannar Jákup Reinert, fiskifrøðingur**



FISKASTOVNAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Skipið hjá Fiskirannsóknarstovuni, Magnus Heinason, hevur í august gjørt tær seinnu yvirlitstrolingarnar í summar.

Toktleiðari á túrinum var Jákup Reinert, fiskifrøðingur.

Høvuðsendamálið við yvirlitstrolingunum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa – bæði í vekt og tali, umframt longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning hjá hesum fiskasløgum.

Á hesum ferðum verða eisini magakanningar gjørdar, og eisini verða skrásetingar gjørdar av øðrum fiskasløgum enn høvuðsfiskasløgunum.

Á hesum seinna túrinum í summar, loysti Magnus Heinason 15. august, og skipið var aftur 26. august. Ólag kom á trolspælið á túrinum, og tí noyddist skipið á Havnina at umvæla spælið, men hetta tók bert stutta tíð.

- Um kvøldið 24. august tóku vit seinastu støðina eystanfyri Sandoynna, men tá fór teljarin á trolspælinum. Vit tóku trolið inn og royndu at umvæla teljaran, so støðin kundi takast umaftur. Hetta eydnaðist ikki, og tískil kom henda støðin at liggja eftir. Soleiðis gjørdist samanlagda talið av støðum í summar 199 – og ikki 200, sigur toktleiðarin á túrinum, Jákup Reinert.

Veiðan, sum Magnus Heinason fekk á túrinum, varð løgd upp á Toftum um morgunin, 25. august, og tá skipið legði at í Havn longu sama morgun, var hesin túrurin liðugur.

### 12 ár á baki

Hetta er tólvta árið á rað, at Fiskirannsóknarstovan ger hesar trolingar, sum vanliga vara í tveir vikur og verða gjørdar á tilsamans 200 trolstøðum, sum liggja spjaddar um allan landgrunnin. Tóvað verður í ein tíma á sama tóvi ár undan ári.

Á tí fyrra túrinum í summar vórðu 127 trolstøðir tiknar, og á hesum seinna túrinum vóru so 73 trolstøðir eftir at taka. Hesar lógu yvirhøvur vestanfyri og sunnanfyri.

Undir hesum kanningum verður landgrunnurin býttur upp í 15 øki eftir dýpi og ætt, og ávíst tal av støðum verður tikið í hvørjum øki.

### Ikki endaligt

Toktleiðarin sigur, at hóast teimum ikki eydnaðist at taka allar hesar 200 støðirnar í hesum umfari, og hóast skipið fekk spælskaða, gekst túrurin kortini hampiliga væl. Níggju tóv miseydnaðust, tí breitlar slitnaðu, og trolið kom fast í botn. Hesi tóv máttu tí gerast umaftur.

- Støðin, sum miseydnaðist, tí teljarin gjørdist í ólagi, hevur verið eykastøð í fleiri ár fyri eina av vanligu støðunum í Sandshavinum. Ætlanin er nú at gera hesa til eina fasta støð og síðan hava eina av teimum truplu støðunum í Sandshavinum sum eyka, sigur Jákup Reinert. Fiskifrøðingurin sigur, at enn eru tølini ikki endaliga løgd undir lupp, men miðjað verður eftir, at hesin túrurin verður klárur at leggja í databasuna í november.

- Ikki fyrr enn nytrurnar eru lisnar, og øll data frá túrinum eru skrásett, ber til at siga nakað nágreiniligt um úrslitini av yvirlitstrolingunum í summar, leggur hann aftrat.

> »*Tølini vísa, at lítið hevur verið at fingið av toski síðan 2003, og í ár var úrslitið tað lakasta síðan 1999. Toskastovnurin á landgrunninum er illa fyri…*«
>
> *(Jákup Reinert, fiskifrøðingur)*

### Mest av upsa

Jákup hevur skrivað eina fyribils frágreiðing sum lýsir, hvussu nógv varð fingið av hvørjum fiskaslagi, og á hvussu nógvum støðum, tey vóru fingin.

- Nógv mest varð fingið av upsa, síðan kemur lítli kongafiskur, hýsa, hvítingsbróðir, svartkjaftur, gulllaksur, stóri kongafiskur og toskur.

Til stuttleikar kann nevnast, at í nøgd var brugda á einum triðja plássi yvir størstu nøgdirnar, sum Magnus Heinason fekk, tí bæði á hesum seinna túrinum – og á tí fyrra í summar – fingu teir brugdu í trolið. (sí mynd).

Tilsamans fekk Magnus Heinason 49 fiskasløg, umframt høgguslokk, bæði mat-og agnhøgguslokk, hummara, rækju og ymiskt annað, ið er bólkað sum skrambul.

- Verða báðir túrarnir í summar lagdir saman, fingu vit 61 fiskasløg tilsamans. Hyggja vit at, hvussu títtleikin er av ymisku fiskasløgunum – á hvussu nógvum støðum tey komu fyri - varð upsi fingin á 96% av teimum 72 støðunum, lítli kongafiskur á 93%, hvítingsbróðir á 86%, toskur á 81% og hýsa á 79% støðum.

### Døpur útlit

Jákup Reinert sigur, at um vit samanbera stovnsmet-